## Hósdagur 7. november

### SVF

17.30 Viftan
18.00 Toktummas 24
18.05 Úlvur í seyðaskinni
18.15 Trý ynski
18.25 Smásøga 1
18.30 Atlantis High
19.00 Eg haldi, at eg livi e
20.00 Dagur og Vika
20.25 Grannar okkara
20.50 Gesturin
21.15 Læknin hevur orðið
21.45 Krimitímin: Blind gudinna 4:4 - Óhóskandi fyri smábørn
22.35 Borð um borð e
23.25 Liðugt

### Eurosport

03:00 Tennis (Live): Wta Championships Los Angeles United States
04:30 Tennis (Live): Wta Championships Los Angeles United States
06:00 Tennis: Wta Championships Los Angeles United States
07:00 Tennis: Wta Championships Los Angeles United States
08:00 Tennis: Wta Championships Los Angeles United States
09:00 Tennis: Wta Championships Los Angeles United States
10:00 Tennis: Wta Championships Los Angeles United States
11:00 Sailing: Sailing World
11:30 Motorsports: Series
12:00 Golf: Challenge Tour
13:00 Tennis: Wta Championships Los Angeles United States
14:00 Tennis: Wta Championships Los Angeles United States
15:00 Tennis: Wta Championships Los Angeles United States
16:00 Tennis: Wta Championships Los Angeles United States
17:00 Football: European Championships Legends
18:00 Football: European Championships Legends
19:00 Tennis: Wta Championships Los Angeles United States
19:45 Tennis: Wta Championships Los Angeles United States
20:30 Tennis (Live): Wta Championships Los Angeles United States
22:00 News: Eurosportnews Report
22:15 Tennis (Live): Wta Championships Los Angeles United States
23:45 Grand Touring: 2002 Series Japan Gt Championship Mine
00:15 News: Eurosportnews Report

### BBC Prime

0.00 TLZ: »A History of British Art – Our House«
0.50 TLZ: »Placido Domingo - The King of Opera«
1.50 TLZ: »Poppea«
2.30 TLZ: »Lesley Garrett Tonight«
3.00 TLZ: »Computing for the Terrified – Electronic Male«
3.30 TLZ: »Branded – Heinz: has Beanz?«
4.10 TLZ: »Renaissance Secrets-Conspiring against the Queen«
4.40 TLZ: »Manchester Divided«
5.10 TLZ: »Greek Language and People – Who's Who«
5.35 Look Ahead
6.00 Step Inside: »The ugly Duckling«
6.10 The Story Makers: »Fasteners«
6.30 Toucan Tecs: »Dolly Rockers«
6.40 Maid Marian & Her Merry Men: »Robin the Bad«
7.05 50/50
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders
8.45 Going for a Song
9.15 The Antiques Show
9.45 Changing Rooms: »Haxey«
10.15 Vets in the Wild
10.45 Lovejoy: »The last of the Uzkoks«
11.45 The Weakest Link
12.30 Passport to the Sun
13.00 Eastenders
13.30 House Invaders
14.00 Going for a Song
14.30 Step Inside: »The ugly Duckling«
14.40 The Story Makers: »Fasteners«
15.00 Toucan Tecs: »Dolly Rockers«
15.10 Maid Marian & Her Merry Men: »Robin the Bad«
15.35 50/50
16.00 Barking Mad
16.30 Ready Steady Cook
17.15 The Weakest Link
18.00 Antiques Roadshow: »Liverpool«
18.30 Ground Force: »Cambridge«
19.00 Eastenders
19.30 Friends Like These
20.30 Chambers: »Survival Trek«
21.00 Blackadder II: »Potato«
21.30 Harry Enfield and Chums
22.00 Attachments: »Ohnosecond«
23.00 Cardiac Arrest: »The Comfort of Strangers«
23.30 Cardiac Arrest: »Bad Blood«

### BBC World

00:00 BBC News
00:30 HARDtalk (r)
01:00 BBC News
01:30 Fast Track (r)
01:45 Holiday (r)
02:00 BBC News
02:30 Simpson's World (r)
03:00 BBC News
03:30 Asia Today (r)
03:45 World Business Report (r)
04:00 BBC News
04:30 HARDtalk
05:00 BBC News
05:30 World Business Report
06:00 BBC News
06:30 World Business Report
07:00 BBC News
07:30 World Business Report
07:45 Sport Today
08:00 BBC News
08:30 Fast Track (r)
08:45 Holiday (r)
09:00 BBC News
09:30 Simpson's World (r)
10:00 BBC News
10:30 Asia Today
10:45 World Business Report
11:00 BBC News
11:30 HARDtalk (r)
12:00 BBC News
12:30 World Business Report
12:45 Sport Today
13:00 BBC News
13:30 Top Gear (r)
14:00 BBC News
14:30 Asia Today
15:00 BBC News
15:30 HARDtalk (r)
16:00 BBC News
16:30 Simpson's World (r)
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Click Online Special
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Life
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

### TV3

05:00 Garfield Og Venner
05:25 Børnehjørnet
07:10 Tv-Shop
08:55 Tv3 Extra - Med Sportsnyt
09:20 Rescue 77
10:15 Popular
11:05 Horton-Sagaen
12:00 Horton-Sagaen
12:50 Ricki Lake
13:45 Cupid And Cate
15:35 Med På Moden
16:05 Ricki Lake
17:00 Alle Elsker Raymond
17:30 Sabrina - Skolens Heks
18:00 Alle Tiders Barnepige
18:30 Tv3 Extra - Med Sportsnyt Direkte:
19:00 Dawsons Creek
19:50 Den Eneste Ene
20:50 Sex And The City
21:30 Frid's Film
22:10 Line's
23:10 Tv3 Extra - Med Sportsnyt
23:40 Seinfeld
00:10 Love Matters
02:05 Mr. Rock 'N' Roll
03:45 Benny Hill
04:20 Godnat

### ÚF

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur - Hans Eiler Hammer, prestur, lesur
07.15 Barnaløtan - Katrin og Kári stíla fyri
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar
08.00 Tíðindi
08.03 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) - Hans Eiler Hammer, prestur, lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen stílar fyri
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.17 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Sostatt (e)
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Birgar Johannesen velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Gospelløtan - Símun Jóannesarson Hansen stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Viðurgerði - Sending við reportasjum, samrøðum og frásagnum úr Suðuroy.
18.00 Barnaløtan (e) - Katrin og Kári stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Skiftissiðir á lívsleiðini - 5. sending - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 David Copperfield - Elin Heinesen lesur 12. part av framhaldssøgu eftir Charles Dickens. Jens Pauli Heinesen týddi.
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

## Skiftissiðir á lívsleiðini

*- 5. sending*

ÚF Hóskvøldið kl. 19.00

Marjun Bæk, prestur sigur frá trúlovilsi og ymiskt í sambandi við giftu, og tá illa vil til - tá fólk skiljast.

## Gesturin: James Olsen



SVF Hóskvøldið kl. 20.50

Fyri James Olsen hevur tónleikur alt at siga. Longu sum blaðungur byrjaði hann at syngja, og síðani hevur tað gingið slag í slag hjá hesum evnaríka sangara og tónleikara. Men hóast hann fyri einum góðum ári síðani stóð á palli í TV 2 saman við Erann DD, so er James nú aftur í Føroyum. "Eg treivst ikki í Danmark, eg kenni meg best í Føroyum", sigur hann. Og her ber eisini til at liva av at undirhalda – hóast tað mangan er hart, heldur hann. James er ættleiddur til Føroya, men tað var ikki fyrr enn hann búði í Íslandi, at hann merkti til rasismu. James hevur framvegis vónina um at kunna liva hampuliga væl av show-business, men so verður tað helst uttanlanda, viðgongur hann.
*Lagt til rættis: Ivan Niclasen.*

## Dawsons Creek (88)



TV3 Hóskvøldið kl. 19.00

Dawson ger av at geva terapiini ein møguleika, sjálvt um hann heldur tað verða løgið at skula deila sínar tankar við einum fremmandum. Samstundis roynir hann at finna útav, um hann skal fara aftur á universitetið og harvið uppfylla síðsta ynskið hjá pápanum, ella um hann skal lurta eftir sínum egnu kenslum og fara til Boston. Pacey og Karen koma nærri at hvør øðrum, sjálvt um Pacey er ørkymlaður um sambandi Karen hevur við Danny...

### Rás 2

09:45 Orðið - Bibliulestur v/ Anju Hansen.
10:00 Floksting (e) - Endursending frá í gjár. Hesaferð við Tjóveldisflokkinum. Sonne Smith leggur til rættis.
11:00 Tónleikur
12:00 Tíðindi
12:15 Tónleikur
13:00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum. Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi
1515 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur. Sonne Smith leggur til rættis.
16:00 Tónleikur
17:00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík. John William og Oliver Joensen leggja til rættis.
18:00 Tíðindi
18:15 Tónleikur
19:00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Andaligur búnaðskapur (9. partur av 9) Jógvan Zachariassen leggur til rættis.
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun. Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
21:30 Tónleikur
22:00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

### Lindin

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H. Spurgeon
13.15 Sjólívið v/ Malmberg Olsen
15.00 Horizon Star v/ Stella Zachariassen
16.00 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
17.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
18.05 Tónleikur
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.15 Tónleikur
20.00 Barnalindin (e)
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H. Spurgeon (e)
21.00 Bønarlinjan, beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevnir kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379 - Heimasíða: www.lindin.fo
00.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti (e)
00.05 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
02.00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna (e) - v/ Símun Absalonsen og Jógvan Zachariassen
03.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
06.00 Vit gevast

---

# ítróttur

Nr. 210 • fríggjadagur • 1. november 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Laudrup vil hava Jón Róa

*Fyri fyrst verður talan um leigusáttmála, men áhugin hjá Brøndby er í øllum førum stórur, og gongst eftir vild hjá báðum pørtum, er lítið at ivast í, at Jón Rói Jacobsen fer at skriva sáttmála við danska stórfelagið í komandi ári*




**Donsk feløg kunnu ikki keypa leikarar aftur fyrr enn 1. januar, men teir í Brøndby eru somikið grammir eftir føroyska landsliðsleikaranum, at teir longu nú vilja hava hann niður at venja við superliguhópinum**

YRKISFÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Síðani avrikið hjá føroyska fótbóltslandsliðnum móti Týsklandi, hevur frá fleiri síðum verið at hoyrt, at áhugin fyri føroyskum landsliðsleikarum er øktur munandi. Men longu undan hesum var eisini ymiskt at frætta í so máta.

Beint undan fráferðini til Litava- Týsklandsdystin var Jón Rói Jacobsen til royndarvenjingar í danska stórfelagnum, Brøndby, og sum skiltist ta ferðina var skoðsmálið frá Brøndby-venjarunum sera gott. Ikki minst eftir at hann taldist millum allar bestu leikararnar í einum dysti fyri eykaliðið hjá Brøndby.

### Laudrup vil síggja meira

Áhugin fyri verjuleikaranum man ikki á nakran hátt vera minkaður eftir teir báðar landsdystirnar, har Jón Rói í báðum førum taldist millum teir allar bestu á føroyska liðnum, og nú er líkt til, at ein varandi avtala er ávegis.

Fyri fyrst er talan tó bert um leigusáttmála. Nýggju transfer-reglurnar innibera millum annað, at feløg ikki kunnu keypa leikarar ávís tíðarskeið av kappingarárinum, og í Danmark er í løtuni stongt fyri handlum fram til 1. januar.

Michael Laudrup og hinir venjararnir í Brøndby hava tó helst longu nú sæð nóg mikið til føroysku fótbóltsevnini, og tí fór Jón Rói longu hósmorgunin til Brøndby, har hann skal venja við superliguliðnum, umframt at spæla dystir við eykaliðnum og U-21 liðnum hjá felagnum.

At tað júst er Michael Laudrup, sum er áhugaður í føroyska landsliðsleikarunum, má undir øllum umstøðum sigast at vera eitt stórt herðaklapp til Jón Róa.

Tá navnframi danin í summar gjørdist venjari hjá Brøndby, var ein hin fyrsti boðskapur hansara, at nú skuldi spælistílurin broytast. Frá pressfótbóltinum, sum Brøndby í nógv ár hevur verið eyðkent fyri, til ein meira kontinentalan spælistíl við fyrimynd úr Barcelona, har Laudrup fýra ár á rað gjørdist meistari við Johan Cruyff sum venjara. Hetta merktist eisini í leikarahópinum, har fleiri leikarar fingu greið boð um, at fótbóltsevni teirra ikki rukku til nýggja spælistílin. Ikki minst í verjupartinum, har talan skuldi vera um meira bóltførandi leikarar.

Og hóast hetta enn ikki hevur givið so góð úrslit, sum áskoðararnir kundu hugsað sær, so hevur leiðslan í felagnum fult álit á, at Laudrup nokk skal fáa kabalina at ganga upp. Brøndby er í løtuni á øðrum plássi í donsku superliguni, seks stig aftan fyri FCK.

### Ikki endaligt

Tá vit mikukvøldið fingu orðið á Jón Róa, var tað sjálvsagt ein spentur landsliðsleikari, sum var í ferð við at pakka klæði og annað niður. Men hóast hetta, so tóktist hann tó at vera somikið avkláraður um støðuna, at hann ikki tók tað fyri givið, at hann fer at halda fram í Brøndby eftir leigumálið. Heldur ikki, hóast tað skuldi víst seg, at áhugi var frá teimum gulu at gera ein veruligan sáttmála.

- Spyrt tú meg beint nú, um eg eri áhugaður í at gera sáttmála við teir, so er svarið sjálvandi ja. Men nú fáa vit at síggja.

- Eg skal vera niðri í ein mánað fyri fyrst. Í desember er vetrarfrí, og daman hjá mær, Súsanna, skal eisini eiga, og tá ætli eg mær so avgjørt at vera her heima. Í januar skal eg so aftur niður, og tá vera bæði genta og barn ætlandi við, og so vit fáa at síggja, hvussu vit fara at trívast. Tað er í øllum førum sera avgerandi í mínari støðutakan, sigur leikarin.

Spurdur, um eisini onnur feløg hava sýnt honum áhuga, sigur hann, at sum so hevur hann ikki frætt nakað serligt. Ikki annað enn okkurt slatur og so onkur smærri feløg, men í øllum førum langt ífrá nakað, sum kann sammetast við Brøndby.

### Skiftir lit

Tað er nokk einki at ivast í, at seinnu árini hevur FCK verið felagið hjá flestu fótbóltsáhugaðum føroyingum, og hóast hann nú fer til Brøndby, so viðgongur Jón Rói, at hetta eisini hevur verið galdandi hjá sær.

- Sjálvandi havi eg alla tíðina vónað, at tað hevur gingið væl hjá Toda, og tað sama er eisini galdandi fyri Christian Høgna og Jákup Mikkelsen, tá hann spældi í Herfølge. Men hinvegin merkir tað ikki, at eg ikki eri áhugaður í Brøndby. Tað vildi í øllum førum verið stuttligt, um at slapp at ansa eftir Toda í onkrum dysti, heldur hann at enda.